

*Høgni Mikkelsen er við at rigga til at seta qr kotu á minnisvarðan yvir manningina á Nólsoy*



*Gravsteinurin hjá teimum á Acorn*




*Gravsteinurin og minnisvarðin fyri teir sum fórust við Riddaranum*

Skanna her
Sluppin Acorn

Skanna her
Sluppin ANNA

# MINNISVARÐAR Í ÍSLANDI VARÐVEITA OKKARA FISKIMANNASØGU

Í juni í ár høvdu vit eina frásøgn um gravsteinin/minnisvarðan á Seyðisfjørðinum í Íslandi yvir teir, sum fórust við Riddaranum í 1927.

Tað nýggja í hesum var, at nú bar til at lesa alla hesa søgu á staðnum við eini QR kotu, sum er sett í ein blómuhaldara.

Henda søgan er tikin úr bókini "Havið tók teir", sum hevur 21 frásagnir um vanlukkur á sjónum, sum hava kostað mannalív. 16 av teimum eru undir Íslandi.

Ein teirra sum hevur staðið á odda fyri hesum tiltaki er Høgni (hjá Einar) Mikkelsen í Havn við stuðul frá Lions Clubbunum í Føroyum.

Vit vístu tá á, at tað eru tríggjar aðrar gravir/minnisvarðar í Íslandi yvir føroyskar fiskimenn, sum er deyðir undir Íslandi.

Teir eru yvir manningin á Onnu, sum gekk burtur í 1924 við 17 monnum, yvir teir sjey menninar við Acorn, sum brendu til deyðis í 1927, og teir 19 menninar við Nólsoy, sum gekk burtur í 1934.

Høgni hevur gjørt skjótt av. Hann hevur saman við øðrum verið í Íslandi, og nú er eru QR kotur eisini settar í hesar minnisvarðarnar.

Teir hjá Onnu og Acorn eru í gamla kirkjugarði í Reykjavík. Men tann hjá Nólsoy er á Eyrarbakka á Suðurlandinum. Har rak kokkurin Bernhard Henriksen á land, og her varð hann grivin. Seinni var minnisvarði fyri alla manningina settur á grøvina hjá honum. Hesin steinurin treingir til ábót. Her er í hvussu er tørvur á, at nøvnini kunnu lesast.

Hetta merkir, at tað ber til at standa við ein minnisvarða og samstundis lesa søguna um lagnuna hjá manningini og síggja myndir av teimum.

Men tað merkir eisini, at tað ber til at sita heima við hús og vitja hesi minnismerki við teirra søgu.

## Góð móttøka í Reykjavík

Høgni letur væl at móttøkuni í Reykjavík. Hann fekk samband við fyrrverandi leiðaran á sjómansheiminum Ørkini, Ragnar Snær Karlsson, og skaffaði hann øll tey loyvi, sum kravdust. Eisini vóru tey blíð á Ørkini.

Í kirkjugarðinum hittu teir gravaran, Heimir Jónasarson, sum var ógvuliga hjálpsamur. Hann var eisini hugtikin av digitaliseringini av gamla kirkjugarði í Havn, har tað ber til eisini í Íslandi á heimasíðum at finna søguna hjá teimum nærum øllum gravsteinunum í hesum kirkjugarði.

Dánjal Pertur Thomsen hevur hjálpt til við uppsetan av QR-kotunum. Myndirnar av minnisvarðunum eru tiknar av Ólavi Frederiksen.

## "Latið ei søguna doyggja"

Tað kann sigast, at hetta stig, sum Høgni hevur framt, er heilt framúr. Hetta snýr seg um ein part av føroysku søguni, sum verður fjarari og fjarari, og sum ógvuliga fá minnast, og skjótt verður eingin eftir. Men nú er hon tøk hjá øllum.

Roynt hevur verið at skriva hesa søgu, meðan fólk enn vóru á lívi sum mintust hetta. Tí hevur tað ofta verið í seinastu løtu, at henda søgan er bjargað. Tað er hugaligt, at tað eru "vanlig" fólk, sum vilja gera ein innsats á hesum øki.

Tí eiga Høgni og hansara felagir at fáa alla ta viðurkenning, sum kann gevast fyri hetta avrik, sum hann hevur fingið framt.

Hetta kann bara geva íblástur til, at tað sama verður gjørt í Føroyum.

*ó.*



*Gravsteinurin og minnisvarðin hjá teimum sum gingu burtur við Onnu*

Skanna her
Sluppin Nólsoy

Sluppin Riddarin